## EG MEINI TAÐ

# "Summi" valdu konur



*Katrin Petersen skrivar:*

Hví halda tit, at summi ikki vilja velja eina kvinnu? Hetta var ein spurningur á heimasíðuni www.javnratt.fo undan løgtingsvalinum.

Og so vóru ymisk væl vald fólk biðin um at svara hesum spurningi. Tey gjørdu sítt besta - hildu, at tað kundi vera fordómar, og at tað vóru ymsar (yvirhøvur onki góðar) grundir til, at "summi ikki vilja velja eina kvinnu."

Men sjálvi høvdu tey ongar sovorðnar grundir.

Og veljararnir hava eftir øllum at døma heldur ikki hugsað stórvegis um at lata vera við at velja eina kvinnu. Toppskorarin av øllum var kvinna. Hægst á javnaðarlistanum í Suðurstreymoy var ein kvinna. Eftir formannin í Tjóðveldisflokkinum vóru tvær kvinnur valdar í Suðurstreymoy.

Og tølini hjá Javnstøðunevndini vístu jú, at upp á seg høvdu tær uppstillaðu kvinnurnar líka nógvar atkvøður sum menninir.

Og eg fái hug at spyrja tey, sum settu spurningin á heimasíðuni - hví halda TIT, at summi ikki vilja velja eina kvinnu? Eru so nógv av hesum "summum" at stríðast við? Valið prógvaði tað so ikki. Tað ber næstan til at siga, at valið prógvaði tað mótsetta!

Nú heldur lesarin kanska, at eg eri ímóti javnstøðu. Yvirhøvur ikki. Eg haldi tað er púra beint av kvinnum at stilla upp, og eg gleði meg at síggja fleiri kvinnur á listunum næstu ferð. Tí tá kunnu tær hugsa um at føra politikk, og ikki um, at "summi" fara at lata vera at velja tær.

Og eg haldi ikki, at vit fáa meira og betri javnstøðu av at samla upp á fordómar um hvat "summi" halda og gera. Trúgvi næstan, at vegurin fram er at fokusera upp á tað, sum eydnast!.

Uttan fyri hjá mær sat ein genta í eini gravimaskinu í dag. Grabbaði mold og uppgrivið asfalt. Eg sat í bilinum og eygleiddi hana. Vit smíltust upp á hvørja aðra, tá hon leyp út úr førarahúsinum. Hevði hug at rópa "gott hon sjálv!" - men lat vera. Kanska hevði hon ikki hug at vera Gravandi Gentan Sum Má Stuðlast. Kanska dugdi hon bara hatta við grabbarum.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro




# Vilt tú hoyrast, so er møguleikin her

Í dag 18. mai verður Pop-Top konsert í Grasagarði í Havn. Her er høvið hjá ungum orkestrunum at gera vart við seg

**KONSERT**

Pop-Top konsertin er møguleikin hjá teim ungu orkestrunum at gera vart við seg. Her er møguleikin at verða hoyrdur. Í dag kl. 16.00 spæla fimm av teimum orkestrunum, sum hava vant allan veturin í Skansastovu, Margarinfabrikkini og Studentaskúlanum, til ta árligu Pop-Top-kappingina, sum eins og undanfarin ár er skipað í samarbeiði við Mjólkarvirki Búnaðarmanna.

Orkestrini eru D-Zenz, Happy, Refleks, Sic og fleiri onnur.

Konsertin bjóðar fram eina ørgrynnu av góðum tónleiki. Orkestrini umboða eitt breitt øki av tí rútmiska tónleikinum. Her er blues, rock, reaggie, heavy metal og friðarligar balladur, og fleiri ókend stílsløg. Eins og hini árini hava bólkarnir verið ídnir til at skriva egin løg og egnar tekstir, sum eisini er eitt eyðkenni fyri bólkar, ið hava nógvar orku og góðan vilja at koma fram. Tað verður ikki lætt at finna vinnaran í Pop-Top-kappingini í ár, tí bólkarnir eru sera javnir og spæla sera væl. Men tað eru áhoyrararnir, ið gera av, hvør ið verður ársins Pop-Top-orkestur. Tann seinasta hálva tíman av konsertini fáa áhoyrararnir møguleika at atkvøða fyri einum orkestri. Í fjør atkvøddu meir enn 300, so tað ræður um at vera til staðar og atkvøða fyri sínum favoritti. Tað vinnandi orkestrið skal spæla á ólavsøkukonsertini í ár og vinnur t-skjúrtur frá MBM. Allir luttakararnir fáa harafturat eitt heilt kartong av poptop frá MBM.

Orkestrið, ið verður nummar eitt, skal spæla á ólavsøku-konsertini. Síðani 1988 hevur Pop-Top-konsertin verið eitt forum, har ungir tónleikarbólkar hava havt møguleika at royna seg yvir fyri einum stórum áhoyraraskara. Ikki so fá av tónleikarunum og orkestrunum, sum hava spælt á Pop-Top-konsertini, hava vit sæð á ólavsøkukonsertini og millum tey bestu til Grand Prix, til dømis Mark No Limits við Teiti Lassen, Clickhaxe og Tangz.

# Føroyingar, íslendingar og grønlendingar hittast

Hósdagin byrjar stóra mentunarstevnan í Keypmannahavn, har list og mentan í Føroyum, Grønlandi og Íslandi eru á skránni

**MENTANARSTEVNA**
*Turið Kjølbro*

Í døgunum 23. til 26. mai verður mentunarstevna í Keypmannahavn, Nordatlantisk Kulturfestival, sum Føroyahúsið, Grønlendingahúsið og Jónshús, Íslendska Mentanarhúsið í Keypmannahavn skipa fyri. Á stevnuni verða nógv tiltøk. Tey verða ymsa staðni í danska høvuðsstaðnum, men tey flestu í Huset í Magstræde.

Listafólk og fólk úr mentunarlívinum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi taka lut. Á skránni eru eitt nú nútíðarlist og bókmentir, filmir og sjónleikur, tónleikur, sangur og dansur, fólkslig mentan, matmentan og mangt, mangt annað.

Vigdís Finnbogadóttir, fyrrverandi íslendskur forseti, letur stevnuna upp. Undir tiltakinum verður grønlendskur trummudansur, føroyskur dansur, sangur og tónleikur. Fyrsta dagin á stevnuni seta føroyskar dagsskránna. Tá verður filmurin hjá Katrin Ottarsdóttir Bye Bye Bluebird frá 1999 vístur, Malan Thomsen kvintet syngur og spælir, og kabarett verður við Eyðuni Johannessen og øðrum kendum sjónleikarum.



# Tað er skeivt altíð at halda seg hava rætt

Tað eru summi fólk, sum altíð halda seg sjálvan hava rætt, meðan øll onnur eru skeiv í sínum áskoðanum. Hesi fólk vera ring at samstarva við og gerast ofta einsamøll, heldur eiðisprestur, Emil Olsen

**SAMRØÐA**
*Edvard Joensen0*

– Summi fólk eru av teirri fatan, at alt tað, tey siga og halda, skulu onnur eisini gera. Hesi fólk eru trupul at fáast við, og fara mangan at standa einsamøll, tí tey virða ikki onnur, sum tískil venda teimum bakið.

Hetta er í grundini tað, Høvuðsprestabønin í 17. kapitli í Jóhannesar Evangeliinum handlar um, sigur Emil Olsen, prestur í Eiðis prestagjaldi, sum seinasta sunnudag prædikaði í Norðskála Kirkju um júst hendan tekstin.

Emil Olsen tosaði í prædiku síni um einleika. Tað at vera eitt í Kristusi, sum tó ikki er tað sama sum, at øll skulu vera eins, sum hann tók til.

Tað er alt ov vanligt, at tað eru fólk, sum halda, at fyri at kunna vera eitt, tað verið seg í trúarlívi ella í politikki, so skulu øll hava somu meining og ganga undir sama oki. Tað er ikki lukkuligt at víkja frá, tí so halda tey, at tú hevur sett teg sjálvan uttan fyri felagsskapin og ert æviga glataður beinanveg, vísir Emil Olsen á.

– Men hetta er so púra skeivt og bert eitt dømi um tað øvugta, heldur hann. Tí tá eru tað júst hesi altvitandi fólkini, sum seta hini uttan fyri felagsskapin.

- Halda tey, tí tey vita ofta ikki, at tað heldur verða tey sjálv, sum detta burtur ímillum. Tí veruleikin verður mangan tann, at tey standa einsamøll við sínum góðu meiningum, meðan øll hini, sum tey ikki vilja hava nakað at gera við, helst eisini hava rætt og eru saman, sigur eiðisprestur.



*– Vit eru farin av leið, tá vit gerast so bókstavatrúgv, at vit gloyma, hvat skriftin sjálv, sum skrivað er við bókstavunum, sigur. Og mangan hava vit tá heldur ikki vit til at skilja, at eisini onnur, sum hava aðra meining enn vit, kunnu hava eina rætta meining, sigur Emil Olsen, sóknarprestur á Eiði*

### Ymisk í einleika

– Tað, at Jesus í Høvuðsprestabønini tosar um einleika og biður fyri teimum, sum í framtíðini skulu boða orð hansara, eiga vit á ongan hátt at leggja út sum, at hann vil, at øll fólk skulu vera eins, sigur Emil Olsen. Tí hann visti væl, og vit eiga eisini at vita, at øll fólk eru født ymisk og hava ymsar mátar at vera uppá.

Hóast vit hava eina felags søk at arbeiða fyri, eiga vit at kunna liva við, at vit ikki øll hava somu meining um, hvussu vit náa hesum málinum. Vit mugu kunna viðganga, at onnur hava aðrar vegir at ganga til sama mál, enn vit hava.

So skulu vit tosa okkum til rættis og samstarva um at náa hesum málinum. Hvørt við sínum amboði og sínari meining, sigur Emil Olsen.

Hann vísir á, at tað mangan innan trúarlívið hevur víst seg, at klandur hevur staðist av, at fólk hava havt ymsar útleggingar av sama teksti. Tað er mangan endað við sliti og spjaðing, og at tað hava sprottið bæði nýggjar samkomur og sektir burtur úr hesum.

– Tað er mangan orsakað av, at summi fólk skulu vera so trúgv móti bókstavinum í bókini, at tey ikki skilja orðini, vísir eiðisprestur á.

Hann tekur sum dømi um, hvussu ymsar uppfatanir kunnu vera, at til dømis løgfrøðingar kunnu leggja sama lógartekst út á ymsan hátt og fáa heilt hvør sína niðurstøðu burturúr.

### Náa sama máli

Soleiðis eigur tað eisini at kunna vera, ella í hvussu er næstan vera, sigur Emil Olsen, tá vit tosa um trúarlív.

- Sjálvandi eiga vit at halda okkum til og skilja boðskapin, boðaður verður. Men tað er ikki altíð tað sama sum, at tað skal leggjast út so heilt bókstaviliga, sum tað er skrivað. Tí vit eiga at minnast til, at skriftirnar, vit í dag hava, hava verið gjøgnum nógvar mannahendur, áðrenn vit, sum nú eru til, hava fingið tær.

– Tað er boðskapin í teimum, sum alt ræður um, og tað er hann, vit eiga at skilja, og honum vit skulu liva eftir, vísir Emil Olsen, prestur á.

Men hann staðfestir tó, at hóast vit eiga at vera »tolerant«, eiga vit kortini ikki at góðtaka alt, sum sagt og gjørt verður. Vit eiga at tala at, tá tað er neyðugt, hóast vit ikki alla somlu tíðina sita við fremstafingri á lofti og halda, at alt, sum onnur gera, er skeivt.

Vit sleppa ikki undan ymsum støðutakanum, og her koma vit aftur til einleika, hóast vit ikki skulu vera eins.

Her verður neyðugt at velja, um vit skulu fylgja fjøldini treytaleyst, ella vit skulu taka eina støðu og standa við hana.

Tá vit gera tað, eiga vit samstundis at hava í huga, at vit kunnu koma at standa einsamøll. Halda vit, at tað vit gera, er rætt, tola vit eisini at standa einsamøll við tí. Men vit eiga at vita, at hini, sum hildu nakað annað, eisini kunnu hava havt rætt, og at vit øll, hvør eftir síni rutu, at enda náa sama málinum, sum øll hava ferðast fram ímóti.

### Smáu ringast

Emil Olsen vísir á, at tað tykist, sum at tey smáu samfeløgini eru tey ringastu í sundurlyndinum.

–Taka vit tær stóru kirkjurnar til dømis, sigur Emil Olsen, vísir tað seg, at tær hava nógv at tosa saman um og samstarva um. Hann nevnir eitt nú katólsku kirkjuna, protestantisku og anglikansku kirkjurnar, sum allar eru ójavnar á máli í sínum trúarjáttanum. Men tær játta kortini somu trúgv á sama Harra. Og tað er tað, sum umræður, tá alt kemur til alt, sigur Emil Olsen.

Tað er nógv minni fordøming millum størru kirkjurnar, enn tað er milum smáu trúarsamfeløgini, sum stinga seg upp ymsastaðni, sigur hann.

Og tað er í grundini heldur ikki so øgiliga løgið, tí hesi smáu samfeløgini eru ofta vorðin til av júst ósemjum. Tey verða myndað av fólki, sum ofta er farið úr eini stórari samkomu, tí tey kundu ikki ganga undir ta ella ta útleggingina og vildu hava rætt til at koma við síni egnu skriftútlegging í síni egnu samkomu.

Tað hava tey so loyvi til, og fáa vanliga eisini frið til tess frá teimum, tey fóru frá. Men øgiliga ofta síggja vit, at somu fólk ikki virða, at øll hini hava eina meining ella trúgv, sum eisini kann vera røtt.

– Tá er tað, sigur Emil Olsen, at bókstavurin kemur fram um skriftina, og útleggingin tekur meiningina frá boðskapinum.